# Magnus Heinason - Túrfrágreiðing
# Yvirlitstroling - djúpt. Túrur nr. 1746
# Tíðarskeið: 14-27/09-2017

**Fólk við frá Havstovuni:** Mourits Mohr Joensen, Guðrun Bjarnadóttir Bech, Jens Arni Thomassen, Regin Kristiansen og Lise Helen Ofstad.

**Ábyrgd:** Lise Helen Ofstad (toktleiðari).

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna botnfisk á djúpum leiðum. Áherðsla varð løgd á at kanna m.a. brosmu, blálongu, gulllaks, stinglaks, langasporl, trantkongafisk og svartkalva. Hitin við botn varð skrásettur.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 40 mm meskavídd í posanum, rockhopper grunnur, 120 m breitlar og Vágs-lemmar. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini klokkan 12:15 fríggjadag 15/9. Byrjaðu við at taka støðirnar eystur og suður av Munkagrunninum. Síðani á Wyville-Thomsonrygginum, á Føroyabanka, Bill Baileybanka (Ytrabanka), Lúsa-banka (Ytstabanka), vestur og norður av Landgrunninum og á Íslandsrygginum (Mynd 1). Veðrið var sera gott 8 teir fyrstu dagarnar og vánaligt restina av túrinum, so vit lógu bakk í næstan tvey døgn tilsamans. Komu inn mikudag 27/9 kl. 02.30.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og Sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg, undantikið gulllaks (bústig 1-7, egin), kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3), langasporl (bústig 1-4, talva 4.4.5), havtasku (bústig 1-5, egin) og stinglaks (bústig 1-5, Gordon *et al.* 2000).

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Miða ímóti at alt er klárt í seinasta lagi 1. desember 2017.

**Fyribilsúrslit:** 75 støðir vórðu tiknar og harav vórðu 73 góðkendar. 86 ymisk fiskasløg vórðu skrásett. Um nøgdin í kg pr. støð verður samanborin við hini árini, so er nøgdin av brosma og svartkalva nærum óbroytt og nøgdin av blálongu, gulllaksi, trantkongafiski, stinglaksi og kubbuta langasporli nakað minni. Eins og undanfarin ár varð nakað av gýtandi gulllaksi fingin. Eisini vóru hál á túrinum við gýtandi hávi. Fleiri sjáldsom fiskasløg vórðu skrásett; nasi, blálaksur, ennifiskur og tøkutonnfiskur. Eisini vóru tvey sløg skrásett fyri fyrstu ferð undir Føroyum. *Chiasmodon niger* (Mynd 2) og *Scopelogadus beanii* (Mynd 3), men hesi sløgini eru ikki endaliga staðfest enn.




**Mynd 1.** Yvirlit yvir støðir á túri 1746.

**Talva 1**. Veiða, nytrur, magar og tal av støðum pr. fiskaslag

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar | Tal av støðum |
|---|---|---|---|---|
| KIKARAFISKUR | 8270.507 | 23 | 10 | 9 |
| SVARTKJAFTUR | 6217.745 | | | 52 |
| HAVMÚS | 3577.492 | | | 38 |
| HYSA | 2970.125 | 40 | 30 | 2 |
| GULLAKSUR | 2837.850 | 134 | 73 | 45 |
| TRANT KONGAFISKUR | 2606.260 | 132 | 36 | 44 |
| GLIGGJHÁVUR | 1189.943 | | | 5 |
| SKRUBBHAVUR | 1126.341 | | | 20 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 979.391 | | | 22 |
| BLÁLONGA | 975.995 | 166 | 85 | 47 |
| STINGLAKSUR | 893.351 | 118 | 31 | 18 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 880.660 | 56 | 12 | 22 |
| SVARTKALVI | 788.909 | 88 | 61 | 22 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 745.709 | | | 19 |
| SVARTHAVUR | 496.765 | | | 7 |
| TINDASKØTA | 404.270 | | | 24 |
| GOMAHOLSHAVUR | 395.322 | | | 9 |
| TOSKUR | 389.630 | 57 | 28 | 9 |
| LOLIGO | 363.022 | | | 2 |
| HAVTASKA | 313.520 | 29 | 24 | 17 |
| SLÆTTHØVD | 282.051 | 13 | 8 | 12 |
| KUBBUTA LANGASPORL | 247.789 | 52 | 23 | 15 |
| LONGA | 246.255 | 22 | 6 | 10 |
| NEVHAVUR | 223.503 | | | 11 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 221.915 | | | 26 |
| MORA | 163.865 | 16 | | 17 |
| BROSMA | 150.255 | 58 | 10 | 31 |
| BUKSVARTI HÁVUR | 128.269 | | | 14 |
| LÍTLA BROSMA | 127.120 | 11 | 1 | 17 |
| GLYSUFISKUR | 120.714 | | | 2 |
| BLÁGOMUR | 83.935 | | | 5 |
| HALAHVASSA SKØTA | 81.220 | | | 8 |
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 68.977 | | | 16 |
| ULVFISKUR | 63.868 | | | 17 |
| BLÁRIDDARI | 43.200 | | | 24 |
| SILVUR MURTUR | 39.179 | | | 6 |
| KLÆNASPORL | 34.067 | | | 16 |
| LÝSINGUR | 33.645 | 7 | 2 | 3 |
| FJAÐURFAGRA HAVMÚS | 33.430 | | | 9 |
| HVASSASPREK | 23.721 | | | 6 |
| SANDSKØTA | 22.565 | | | 4 |
| LALLA | 22.103 | | | 9 |
| KLINGRUSKØTA | 21.145 | | | 7 |
| GLASKVOYSA | 14.167 | | | 4 |
| KJAFTSVARTI HAVUR | 11.877 | | | 5 |
| SVARTFISKUR | 10.079 | 2 | 1 | 9 |
| REYÐKRABBI | 9.485 | | | 6 |
| TINDABAK | 7.735 | | | 2 |
| HÁKELLING | 7.360 | | | 1 |
| SKOETA(BATIS) | 7.150 | | | 1 |
| RISNA LANGASPORL | 6.478 | | | 1 |
| ÚLVFISKABRÓÐIR | 6.185 | | | 3 |
| MAKRELUR | 3.802 | | | 4 |
| BERYX SPLENDENS | 3.757 | | | 2 |
| HEKSAKRABBI | 3.690 | | | 2 |
| LÍTLIGLÁMUR | 3.188 | | | 14 |
| LIRI | 2.885 | | | 1 |
| MJAI PRIKKAFISKUR | 2.341 | | | 14 |
| UPSI | 2.260 | | | 1 |
| RONDSVARTI HÁVUR | 1.315 | | | 2 |
| NASI | 1.015 | | | 1 |
| LITLA LAKSATOBIS | 1.005 | | | 7 |
| REYDA HORNABROSMA | 0.805 | | | 2 |
| HISTIOTEUTHIS BONNELLII | 0.750 | | | 1 |
| TUNGA | 0.705 | | | 1 |
| GUNTERS LANGASPORL | 0.523 | | | 4 |
| SMÁTINDABAK | 0.487 | | | 2 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| SERRIVOMER | 0.412 | | | 3 |
| SILD | 0.350 | | | 1 |
| KRYTTLINGUR | 0.306 | | | 2 |
| MJÁANGI | 0.279 | | | 2 |
| SNIPUALLUR | 0.169 | | | 3 |
| ENNIFISKUR | 0.168 | | | 1 |
| SLOANS ORMFISKUR | 0.150 | | | 3 |
| SÆVARANGI | 0.144 | | | 2 |
| SEILUR | 0.082 | | | 1 |
| TRØLLAHUMMARI | 0.074 | | | 1 |
| TØKUTANNFISKUR | 0.073 | | | 1 |
| BOA-DREKAFISKUR | 0.067 | | | 2 |
| TRANT LANGASPORL | 0.064 | | | 1 |
| ISHAVS SUGFISKUR | 0.062 | | | 2 |
| SCOPELOGADUS BEANII | 0.049 | | | 2 |
| BLÁLAKSUR | 0.048 | | | 1 |
| ALLOTEUTIS SUBULATA | 0.044 | | | 1 |
| STORA LAKSATOBIS | 0.042 | | | 1 |
| LITLI PRIKKAFISKUR | 0.040 | | | 5 |
| ELEDONE | 0.039 | | | 1 |
| MCDONALDS PRIKKAFISKUR | 0.036 | | | 1 |
| KNURRHANI | 0.027 | | | 4 |
| SMÁSKRUBBUTI GLÁMUR | 0.016 | | | 1 |
| CHIASMODON NIGER | 0.014 | | | 1 |
| LJÓSANGI | 0.010 | | | 1 |
| GESTFISKUR | 0.007 | | | 2 |
| LAKSSILD | 0.001 | | | 1 |
| LJÓSA SILVURØKS | 0.001 | | | 1 |
| Ymist (ostur, skrambul v.m) | 989.604 | | | |
| **TILSAMANS** | **40006.957** | **1024** | **441** | |



**Mynd 2.** *Chiasmodon niger* (á donskum “slukhalsfisk”, á enskum “black swallower”), 115 mm langur og vigar 14 gram. Fingin á umleið 900 metra dýpi millum Føroyabanka og Bill Baileybanka.



**Mynd 3.** *Scopelogadus beanii* (á donskum “Beans kogleskælfisk”, á enskum “Beans bigscale”), 96 mm langur og vigar 14 gram. Fingin á umleið 800 metra dýpi norðan fyri Bill Baileybanka.

**Viðmerkingar:** Ymiskir forkunnugir fiskar o.a. vórðu fryst til Vísindavøkuna. Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar í imp-útskriftirnar.

<u>Lise H. Ofstad</u>